VINNUMÁLARÁÐIÐ

Tórshavn, 24. apríl 2026
J.nr.: 25/28459

Fylgiskjal 6

Upprit um innkomnar viðmerkingar til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu (Fuglaveiðulógin)

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Bóndafelag Føroya, Føroya Óðalsfelag, Djóraverndarfelagnum, Tjóðsavninum, Havstovuni og Føroya Fuglafrøðifelag.
Harumframt hevur uppskotið ligið frammi á heimasíðuni hjá Tilfeingis- og vinnumálaráðnum og á ummælisportalinum frá 15. januar til 1. februar 2026.
Inn komu hoyringarsvar frá hesum pørtum:

1.5.1 Føroya Fuglafrøðifelag

Føroya Fuglafrøðifelag mælir frá at samtykkja uppskotið.
Føroya Fuglafrøðifelag vísir á, at veiðan ikki kann vera burðardygg, tá man ikki hevur eina ítøkiliga stovnsmeting, sum man kann byggja veiðuna á. Somuleiðis vísir felagið á, at grundað á tær fuglateljingar, sum hava verið, so er stovnurin lítil og viðbrekin.
Felagið metir, at tað ikki er í samsvari við Bonn-sáttmálan, AEWA- og CBD- avtaluna, at veiða verður loyvd av grágásastovninum. Felagið vísir eisini á, at tað er ivasamt, hvussu stórur missurin er fyri landbúnaðarvinnuna. Felagið vísir á, at fuglateljingarnar fyri 2024 geva eina ábending um, at tað bara er eitt avmarkað fuglatal, sum setur seg á velt lendi í juni, juli og byrjanini av august, tá bøurin skal hava frið. Føroya Fuglafrøðifelag vísir eisini á, at tað er meira sannlíkt, at haran er til ampa fyri landbúnaðin enn grágásin, tí at harustovnurin er rættiliga stórur.
At enda vísir Føroya Fuglafrøðifelag á, at tað tíverri er vanligt, at komið verður fram á lamskotnar grágæs. Tey mæla til, at munagóð tiltøk verða sett í verk, so at hetta ikki hendir frameftir, m.a. við at seta á stovn eina mannagongd, har lamskotnar gæs verða fráboðaðar og avlívaðar, eins og at veiðufólk fáa undirvísing í, hvussu grágás skal veiðast.

Viðmerking

Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at tað at skjóta grágás ella brandgás ikki í sjálvum sær er í andsøgn við Bonn-sáttmálan og AEWA- og CBD-avtaluna, men at tað er treytað av, at talan er um burðardygga veiðu. Mett verður eisini, at ein avmarkað skjóting kann verða loyvd, so avgrøði o.a. fær frið, meðan neyðugu teljingarnar verða gjørdar. Búnaðarstovan hevur kunnað Vinnumálaráðið um, at samlaða veiðan av grágás yvir tey seinastu 5 árini hevur verið upp á 129 fuglar, og at bøndurnir, sum hava fingið loyvi at skjóta grágás, nýta hesa heimildina við afturhaldni. Skotið verður bara, um ikki ber til at fáa fuglin av bønum við minni inntrívandi átøkum. Ongin veiða hevur verið loyvd eftir brandgás, men metingin er, at bøndurnir á sama hátt fara at nýta rættin at skjóta ampafugl við afturhaldni.

Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at tey og Búnaðarstovan fara at viðgera hvussu ein skipan at boða frá og avlíva lamskotnar villgæs kann skipast, og hvussu tað kann fyribyrgjast, at villgæs verða lamskotnar.

1.5.2 Tjóðsavnið

Innleiðandi hevur Tjóðsavnið nakrar lógartekniskar viðmerkingar til lógaruppskotið, sum var til hoyringar. Lógaruppskotið varð broytt aftaná at hava verið til eftirkanningar hjá Lógartænastuni, og tí verður ikki tikin støða til hendan partin av viðmerkingunum.
Tjóðsavnið metir, at tær almennu viðmerkingarnar ikki eru nóg greiðar, og mælir til, at tað verður nágreinað, nær man kann søkja um og fáa eitt loyvi at skjóta grágás. Somuleiðis meta tey, at tað má vera eitt minstamark fyri, nær loyvi verða givin til at skjóta grágás.
Tjóðsavnið mælir til, at fuglateljingarnar av grágásastovninum verða endurskoðaðar og verða gjørdar á hvørjum ári, soleiðis at man fær eitt greitt yvirlit yvir grágásastovnin og stovnsgongdina.

Viðmerking

Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at talan einans er um loyvi at skjóta fugl, sum er til ampa fyri landbúnaðin. Tað er ikki ásett eitt tal yvir, hvussu nógvir fuglar skulu vera til ampa fyri ein bónda, jarðareigara ella leigara, fyri at viðkomandi kann søkja um og fáa loyvi at skjóta. Tað verður heldur ikki sett nakað krav um, at tey, sum hava ampa av grágás ella brandgás, skulu seta í verk fleiri átøk fyri at styggja fuglin. Tey, sum hava havt loyvi at skjóta ampafugl, hava nýtt hesi rættindi við afturhaldni. Hvørt loyvi verður givið, grundað á eina ítøkiliga meting av hvørjari einstakari umsókn um at fáa loyvi at skjóta ampafugl.
Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at tær fuglateljingar, sum eru av grágásini, og sum skulu setast á stovn fyri brandgásina, skulu nýtast til at koma við eini ítøkiligari meting av, hvussu stór ein burðardygg veiða av hesum fuglastovni kann vera. Tí verður mett, at tað er nøktandi, at fuglateljingarnar eru yvir 5 ár í senn, við 5 - 10 ára millumbilum ímillum hvørja fuglateljing.

1.5.3 Umhvørvisstovan

Umhvørvisstovan vísir á, at grágásastovnurin er bæði ein bú- og flytifuglur, og somuleiðis verður víst á, at stovnurin er fevndur av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals). Tey vísa á, at Danmark, Ísland og Bretland loyva veiðu av grágás eina avmarkaða tíð á árinum, tí at veiða ikki eigur at fara fram í bútíðini, tá grágásin er fjaðursár.
Umhvørvisstovan mælir til, at granskað verður í, hvussu grágásin ferðast, og at upplýst verður, hvussu nógvur fuglur verður veiddur, og at teljingar av grágásastovninum halda fram.
Umhvørvisstovan vísir á, at við verandi kunning er ikki nøktandi grundarlag fyri at meta um ávirkanina, sum veiða hevur á stovnin.

Viðmerking

Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at Búnaðarstovan setur sum treyt fyri at fáa loyvi at skjóta grágás ella brandgás, at gás, sum liggur á eggum ella gongur við ófloygdum unga, ikki verður skotin. Tey, sum hava loyvi til at skjóta grágás ella brandgás, skulu boða Búnaðarstovuni frá, hvussu nógvur fuglur er skotin.
Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at tær fuglateljingar, sum eru av grágásini, og sum skulu setast á stovn fyri brandgásina, skulu nýtast til at koma við eini ítøkiligari meting av, hvussu stór ein burðardygg veiða av hesum fuglastovni kann vera. Tí verður mett, at tað er nøktandi, at fuglateljingarnar eru yvir 5 ár í senn, við 5-10 ára millumbilum ímillum hvørja fuglateljing.

1.5.4 Bóndafelag Føroya

Bóndafelag Føroya tekur, sum heild, undir við uppskotinum, men heitir somuleiðis á Tilfeingis- og vinnumálaráðið, at tað skal vera møguligt at skjóta brandgás (Branta leucopsis) undir somu treytum, sum tað er loyvt at skjóta grágás, við tí grundgeving, at brandgásin eisini er vorðin til ein veruligan ampa fyri landbúnaðin.

Viðmerking

Vinnumálaráðið skal viðmerkja, at brandgásin eins og grágásin er fevnd av Bonn-sáttmálanum (Convention on Migratory Species of Wild Animals), AEWA-avtaluni (Agreement on the Conservation of African-Eurasian Migratory Waterbirds) og sáttmálanum um lívfrøðiligt margfeldi (The Convention on Biological Diversity). Vinnumálaráðið metir, at tað er grundarlag fyri at loyva bóndum, jarðareigarum ella leigarum at skjóta brandgás eftir somu treytum sum at skjóta grágás. Hetta merkir at bøndur, jarðareigarar og leigarar kunnu søkja um og fáa loyvi at skjóta brandgás, sum er til ampa fyri landbúnaðin, so leingi krøvini, sum eru ásett í lógini, verða uppfylt. Fyri at fáa eina neyva meting av, um hetta er burðardygt, er neyðugt at fáa greiðu á, hvussu stórur stovnurin av brandgás er. Tí er ætlanin at seta á stovn fuglateljingar av brandgás, fyri at kunna brúka hetta sum eitt vísindaligt grundarlag fyri eini avgerð um at kunna skjóta brandgás.

Vinnumálaráðið tekur við hesum viðmerkingum undir við tilmælinum hjá Bóndafelag Føroya, og hevur tillaga lógaruppskotið, til eisini at loyva bóndum, jarðareigarum ella leigarum at skjóta brandgás, undir teimum somu treytunum, sum eru til grágásina.

Jarmund Michelsen
Fulltrúi